## DAGSINS MEINING

# Politisk kúvending

Forsætisráðharri Ísraels, Ariel Sharon hevur gjørt av at fara úr Likud flokkinum. Hann fer í staðin at stovna ein heilt nýggjan politiskan flokk. Sharon hevur síðan hann av álvara fór undir friðartilgongdina við palæstinar havt stórar trupulleikar við høgravongin í Likud flokkinum. Hesin vongur trýr ikki uppá friðartilgongdina, og hesin vongur heldur ikki, at tað ber til at gera avtalur við palæstinsku sjálvstýrisstjórnina í Gaza. Her er veruliga hend ein kúvending í politisku starvsleið Sharons. Hann, sum hevur verið ein tiltikin og harðrendur høgrapolitikkari, boðar nú frá, at hann fer at stovna flokk, ið politiskt fer leggja seg á miðjuni í ísraelskum politikki. Henda avgerð Sharons hevur skelkað ísraelskan politikk, og eingin heldur seg veruliga til í dag at spáa um, hvat fer at henda. Sharon hevur verið hjá forsetanum Moshe Katzav og heitt á hann um at skriva út val. Kazav hevur boðað frá, at hann er púra samdur við Sharon og heldur, at val eigur at verða útskrivað sum skjótast til tess at fáa greiði á politisku støðuni.

Orsøkirnar til at Sharon hevur tikið hettas stig eru fleiri. Fyri tað fyrsta hevur Sharon mist samgongupartnaran Arbeiðaraflokkin, sum hevur tikið seg úr samgonguni. Í øðrum lagi er talan um álvarsamar trupulleikar innanfloks í Likud. Her hevur leingi prutlað undir lokinum og er tað serstakliga erkifíggindi Sharons, Netanyahu, sum hevur gjørt Sharon politiska lívið súrt. Netanyahu hevur so at siga dagliga funnist at friðarpolitikki Sharons og støðugt ávarað ímóti at gera avtalur við sjálvstýrisstjórnina í Gaza. Tey, ið vanliga gera viðmerkingar til ísraelskan politikk, eru púra paff av stigi Sharons og metingarnar eru sum heild, at hetta fer fullkomuliga at kollvelta ísraelskan politikk. Í løtuni er eingin veruligur miðflokkur í Knesset. Tað er tí sera torført at spáa um, hvussu alt hetta fer at ávirka politisku støðuna í landinum.

Men eisini Arbeiðaraflokkurin hevur sínar trupulleikar at dragast við. Heilir tíggju tinglimir hjá flokkinum hava júst ament boðað frá, at teir fara at fylgja Sharon yvir í tann nýggja miðflokkin. Hetta er ein stór smeitur fyri Arbeiðaraflokkin. Orsøkin til henda nýggja og óvæntaða trupulleika tykist vera tað formansskiftið, ið júst er hent í flokkinum. Her er hend ein stór broyting, og eitt heilt nýtt ættarlið tykist at hava tikið ræðið í Arbeiðaraflokkinum. Valið í Ísrael er avgerandi fyri friðartilgongdina. Atfinningarnar móti friðartilgongdini eru stórar í Likud eins væl og í Arbeiðaraflokkinum. Ein triði flokkur á politiska pallinum fer neyvan at gera støðuna lættari. Hinvegin kann heimurin bara bíða og vóna, at vit og skil sigra á valinum, so friðartilgongdin kann halda fram.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Málsligur fordómur

**Jeffrei Henriksen**



Fordómur er tað sama sum dómur frammanundan. Vanliga er hann neitin; men hann kann eisini vera játin.

Ein fordómur er tann, at enskt skal vera mest framkomna málið í heiminum. Og aftaná kemur próvførslan, eitt nú tann, at við tað at enskt skal vera tað orðaríkasta málið í heiminum, so má orðaríkdómurin vera eitt dømi um, hvussu framkomið málið er. Orðaríkdómurin hjá Shakespeare er tiltikin; men kann tað ikki hugsast, at maðurin hevur smíðað summi orðini sjálvur?

Sjálvandi hevur eitt framkomið ídnaðarmál orð fyri øllum sínum ídnaði; men orð er skjótt at smíða. Og tað gera teir á enskum óvandnari enn vit á føroyskum. Orðasmíð sum „hardware“ og „software“, „Input“ og „output“ o.tíl. hevði valla verið góðtikið í føroyskum.

Orðamongd valdast. Á føroyskum finnast orð sum „hali, tagl, vel, stertur, sporl, sveiv, hamarstjølur, saks.“ Vit kunnu ikki við virðing fyri okkum sjálvum nevna alt hetta „hala,“ eins og teir á enskum kunnu nevna tað og annað slíkt „tail“ alt samalt.

Kanska skuldi tað kortini ikki verið so nógv orðamongdin, ið telur, men heldur nýtslumøguleikarnir?

Tú, onkur og at siga munnu vera vanlig gerandisorð í øllum málum, somuleiðis eg, teg og at hoyra. Men máliskurnar „okkurt sigur tú!“ og „eg hoyri teg,“ - munnu tær ikki vera rættiliga serføroyskar? líkar, og kortini er munur á meiningini, diplomatisk orðføring á hægsta stigi!

Ella tak orðalagið: „Eg havi aðrar vinir enn tú“ og „Eg havi aðrar vinir enn teg.“ - Hvussu eitur hetta á enskum? - Jú, fleiri orð!

Orðalagið man heldur vera tað, ið týdning hevur í spurninginum um dygdarmál: Hvussu fá orð nýtast til greitt siga tað, ið sigast skal? Hygg at einihvørji týðing úr einum máli í annað og ber saman tekstlongdina. Enskur ella danskur tekstur er vanliga ólíka longri enn føroyskur. - Skal tað vera meir framkomið at noyðast at nýta fleiri orð enn annar til at siga tað sama? Heldur er tað orðalagið, ið ger munin. Og her gongur tíverri illa aftur á hondina við føroyskum. Hjá eldra ættarliðinum er merkingarmunur á, um tú t.d. blandar eitthvørt saman við einum øðrum, ella tú blandar tað saman við eitt annað, men nú er tíverri bland komið í.

At Ongland ta tíð, tað var, legði stóran part av heiminum undir seg og trokaði sítt mál inn allastaðni har, er ein onnur søga; og tað er so eisini ein spurningur, um restin av heiminum av fríum vilja skal geva seg undir hetta málsliga (og harvið mentanarliga!) harradømið.

Satt er tað, at enskt gongur fyri at verða nýtt sum millutjóðamál; men tey, ið ferðast hava í øðrum londum, hava mangan ásannað, at ikki øll tey, ið hava lært enskt, eisini duga tað.

Á eini vísindaligari rannsóknarferð við suðurpólin við fólki úr ymiskum tjóðum, m.a. einum breta, var sum vant enskt samskiftismálið. Onkur, sum við var, lovaði, at hann fór ikki oftari tílíka ferð, um nakar breti var við, tí bretin hevði so stóran fyrimun mótvegis hinum við at sleppa at nýta sítt móðurmál, at hann hevði ræðið á øllum práti og orðaskifti.

Tey eru ikki so fá, ið duga at síggja vandan í tí, at ikki bert ein heil tjóð, men víðari mentanarøki enn so, eitt nú øll norðurlond, geva seg undir at læra eitt og sama mál sum fyrsta frammandamál. Hesin vandin er ikki bara málsligur, so at skilja, at fremmandamálið trokar seg inn á móðurmálið; vandin er eisini mentanarligur, við tað at einum og hvørjum máli fylgir tann mentan, ið málið umboðar, hugsanarháttur, orðføring, skaldskaparháttur, tónleikur o.s.fr.

Fjølbroytni er virði, sum vert er at varðveita í heimsmentanini; men hetta fjølbroytni svinnur, m.a. so hvørt sum mál doyggja; og tað sigst vera vanligari nú, enn bert fá hava skil fyri.

Eg sigi ikki, at vit eiga at fara at byrgja okkum inni málsliga; tvørturímóti eru hyggjuráðini, at summi leggja dent á at læra seg enskt, men bert summi, onnur skuldu heldur lagt dent á týskt, franskt, japanskt o.s.fr. Tá høvdu vit havt fleiri gluggar úteftir, enn sum nú er.

Sum felags millumtjóðamál verður hvørki enskt ella nakað annað tjóðarmál nakrantíð góðtikið, so leingi onnur tjóðarmál og fólk við sjálvsvirðing eru til. So mikið hevur søgan prógvað.

# Ferðslulógin

**- og økt ferð hjá prutlum og skootarum**

**Miriam Hinz, Hoyvík**

Nú tað eru ætlanir um at økja mest loyvdu ferðina hjá prutlum og skootarum, vil eg gjarna gera hesa viðmerking. Tað er í fínasta lagi, at mest loyvda ferðin verður økt til 45 km/t, so prutl/skootarar ikki eru til ampa fyri ferðsluna. Men so mugu hesi eisini halda seg ferðslulógina til annars.

Eg standi hvønn morgun í bíðirað við rundkoyringina uppi við Ítróttarhøllina, og hvønn morgun koma í minsta lagi 4 prutl/skootarar fúkandi framvið - uppi á gongubreytini. Hetta kann ikki vera rætt ella? Í øllum førum eri eg glað fyri, at eg ikki um morgunin - og ofta í skýming ella myrkri, tað velst um árstíðina - skal ganga á gongubreytini - við prutlum og skootarum fúkandi framvið.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14:00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.